# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Vónandi verður ein hvala-barr opin, so vit kunnu fáa eina øl og ein lundaburgara*

*Manchester City-fjeppari*

# City-fjepparar óttast Føroyar

**Manchester City fjepparar óttast undan fráferðini til Føroya í komandi viku. Tað er ikki EB/Streymur, sum er ræðandi, men heldur flogvøllurin í Vágunum og manglandi frítíðarmøguleikar. Fleiri ætla sær eisini á festival í Gøtu**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*City-viðhaldsfólkini óttast flogvøllin í Vágum, har tað sambært teimum, einans serútbúnir flogskiparar kunnu seta flogførini*

*Savnsmynd*

- Eg veit ikki reiðuliga, hvussu tað er við Charters, men flogskiparnir skulu hava serstaka venjing, um teir skulu lenda á Vágar Flogvølli. So møguleikarnir eru neyvan fleiri.

Á kjaksíðuni hjá Manchester City verður dúgliga gitt og hugleitt um Føroyar og komandi altjóða uppgávuna hjá felagnum: EB/Streym úr Sundalagnum.

Prátið snýr seg serliga um møguleikarnir at sleppa á Tórsvøll tann 17. juni. Fleiri hava ætlanir um at koma til Føroya, men kjakararnir eru varhugaðir um vandan við flogvøllinum í Vágum. Myndir av vøllinum eru á kjaksíðuni, og meðan summir bara rista við høvdinum, ætla aðrir seg til Føroya av eini orsøk: Alskurin til Manchester City Football Club.

- Eg havi sett mær fyri at síggja allar dystirnar í hesum kappingarárinum, og eg verði tískil noyddur at fara, heldur ein fyri.

### Manglandi møguleikar

Eitt av kjakevnunum er, hvat fjepparanir skulu nýta frítíðina í Føroyum til. Nakrir siga seg vita um eitt tiltak, har elektroniskur tónleikur verður spældur í fulldrøn í tveir dagar. Og sum skilst er ætlanin at verða í Gøtu alt vikuskiftið.

Tað tykist tó sum, at ein stórur bólkur kannar møguleikarnir at koma til landið um morgunin, og síðan sleppa heim aftur eftir dystin. Teir ætla sær ikki at steðga ov leingi á í Føroyum, tí – sum teir siga – so óttast fjepparanir, at teir fara at ganga fyri einki í høvuðsstaðnum í ein heilan dag.

- Vónandi verður ein hvala-barr opin, so vit kunnu fáa eina øl og ein lundaburgara. Eg havi ikki peiling av, hvat eg skal gera, áðrenn kick-off verður, sigur ein ilskandi íbúgvi í Manchester.

- Tað sær út sum ein fans óslætt oyggj við bara fjøllum og dalum, og einum svakum og skallutum manni sitandi ímóti einum veggi við eini banjo í hondini, er beiska aftursvarið hjá einum kjakara.

Hvussu verður og ikki, so kunnu vit í øllum vænta at síggja fleiri ljósabláar, larmandi og fullar onglendingar í havnargøtum í komandi viku. Teir ætla sær at veita allan stuðul til sítt elskaða felag, sum fyri fyrstu ferð hevur Mark Hughes við stýrisvølin.

**Hesir verða sambært einum kjakara í byrjunaruppstillingini hjá EB/Streymi:**

1. Dave the butcher: Get all your local meat here.
2. Sid the scaffolder: For all your scaffolding needs.
3. Terry the taxi driver: Airport transfers a speciality.
4. Barry the bricklayer: Extensions and conservatorys at low low prices.
5. Pete the plumber: 24 hour service.
6. Danny the digger driver: Footings dug, self hire available.
7. Ray the roofer: Insurance work undertaken.
8. Eddie the electrician: Total re-wires to changing a light bulb.
9. Colin the copper: Local law enforcement.
10. Fred the fireman: Local firefighter.
11. Gordon the gay: The only gay in the village.

---

NSÍ – HB:

# Bæði renna aftaná

**Hvørki NSÍ ella HB hava gjørt sær dælt av aldudalinum hjá oddaliðnum úr Sundalagnum. Nú hittast liðini við Løkin í morgin**

UPPTAKT
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

NSÍ og HB renna í løtuni aftaná oddaliðnum, EB/Streymi, sum ikki hevur fingið stig í seinastu tveimum landskappingardystunum. Fjarstøðan til nærmastu kappingarneytarnir er tó ikki økt, og í seinasta dystinum undan summarsteðginum kann annað av liðunum vinna týðandi stig í stríðnum um gullið.

### Tvey mál fleiri

Undan seinasta vikuskifti hevði NSÍ ikki tapt í seks landskappingardystum. Góða úrtøkan seinastu vikurnar fekk runavíkingar aftur í stríðið um heiðursmerkini.

Johan Nielsen, venjari, staðfestir, at ósigurin fyri Víkingi við Løkin fríggjakvøldið ikki hevur fingið keðiliga ávirkan á hópin. Fyrireikingarnar vóru alt fyri eitt vendar ímóti komandi uppgávuni: HB á heimavølli.

- Tað er eingin einstakur leikari, sum vit serliga skulu ansa eftir. Sum ein heild eru HB sera sterkir, og á øllum plássum noyðast vit at vera til reiðar. Grundarlagið fyri einum sigri er at skjóta fleiri mál enn mótstøðuliðið, og tað ætla vit sjálvsagt eisini, sigur Johan Nielsen, sum ikki vil avdúka nakað um uppleggið.

*Í farnu viku skiftu bæði Jónas Þór Næs og Karoly Potemkin til NSÍ. Hvørja ávirkan kunnu teir fáa framyvir?*

- Teir fara í øllum førum at spæla. So fáa vit at síggja, staðfestir hann.

Johan Nielsen hevur allar sínar mans tøkar, uttan Aco Pandurovic, sum sá beinleiðis reytt í dystinum móti Víkingi.

### Hugsa ikki um avleiðingar

Eftir fleiri vikur, har úrslitini ikki vóru nøktandi, kom HB aftur á beint um vikuskiftið við knúsandi stórsigri á B68 í Gundadali. Jákup á Borg staðfestir, at fyrireikingarnar av tí sama hava verið betri.

*Men kann ein ósigur í Runavík ikki fáa ógvusligan bakslattur?*

- Tað hugsa vit als ikki um. Vit ætla okkum trý stig, ella í ringasta føri ein javnleik. Styrkin hjá okkum er í framrættaða spælinum, og hóast tað ikki altíð riggar serliga væl, so verður tað ein týðandi partur av upplegginum, sigur landsliðsleikarin.

Jákup á Borg noyddist sjálvur av vøllinum móti B68 við skaða í lærkrikanum, men væntandi verður hann við í morgin. Rasmus Nolsøe verður ikki við, orsaka av skaða. Dysturin verður við Løkin í Runavík kl. 19.00.